| **Aftale mellem Danmarks regering og Færøernes landsstyre om ændring af fordeling af bødeprovenu mellem landskassen og statskassen** | **Avtala millum stjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri um broyting av býtinum av sektarúrtøkuni millum landskassan og statskassan** |
| --- | --- |
| Danmarks regering og Færøernes landsstyre har besluttet at ændre fordelingen af bødeprovenu mellem statskassen og landskassen. Aftalen betyder, at indtægter fra bøder og konfiskationer, som pålægges eller idømmes efter lovgivning på overtagne sagsområder, fra den 1. januar 2026 tilfalder landskassen, mens indtægter fra bøder og konfiskationer for lovovertrædelser i fællesanliggender tilfalder statskassen. Undtaget denne aftale er indtægter, der hidrører fra Færøernes Politis håndhævelse af overtrædelser af den færøske færdselslov. Disse tilfalder fortsat statskassen. | Danska stjórnin og Føroya Landsstýri hava avgjørt at broyta býtið av sektarúrtøkuni millum statskassan og landskassan. Avtalan merkir, at inntøkurnar frá sektum og inndráttum sum verða álagdar ella dømdar eftir lóggávu í yvirtiknum málum frá 1. januar 2026 fara í landskassan, meðan inntøkurnar frá sektum og inndráttum sum verða álagdar ella dømdar eftir lóggávu í felagsmálum fara í statskassan. Undantikið hesi avtalu eru inntøkur sum stava frá handhevjingini hjá løgregluni í Føroyum av føroysku ferðslulógini. Hesar fara framhaldandi í statskassan. |
| Landsstyret vil inden længe fremsætte for Lagtinget et forslag til lagtingslov om at bringe § 50, stk. 1, i straffeloven, i overensstemmelse hermed. | Landsstýrið fer í næstum at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um at broyta § 50, stk. 1 í revsilógini soleiðis at hon samsvarar hesum |
| Aftalen mellem Statsministeriet og Færøernes landsstyre, underskrevet den 17. august 1981 henholdsvis den 10. maj 1982, om fordeling af provenuet af visse bøder og konfiskationsindtægter, der hidrører fra overtrædelser af gældende lov og bestemmelser om fiskeri på fiskeriterritoriet ved Færøerne, ophæves. | Avtalan millum forsætismálaráðið og Føroya Landsstýrið, undirskrivað ávikavist hin 17. august 1981 og 10. mai 1982, um býti av úrtøkuni av ávísum sektum og inndráttarinntøkum, sum stava frá broti á galdandi lóg og ásetingar um fiskiskap á fiskiøkinum við Føroyar, fer úr gildi. |
| Regeringen og landsstyret vil indarbejde de bevillingsmæssige konsekvenser på henholdsvis den danske og færøske finanslov | Stjórnin og landsstýrið fara at innarbeiða tær játtanarligu avleiðingarnar í ávikavist donsku og føroysku fíggjarlógina fyri 2026. |

| | |
|---|---|
| for 2026.<br><br>Tórshavn, den 17. juni 2025<br><br>Mette Frederiksen<br>Statsminister<br><br>Peter Hummelgaard<br>Justitsminister | Tórshavn, tann 17. juni 2025<br><br>Aksel V. Johannesen<br>Løgmaður<br><br>Bjarni Kárason Petersen<br>Landsstýrismaður í lógarmálum |